*Málið um leikloyvið hjá Súna Fríða Johannesen líkist alt meira einum máli, sum kann fáa sera stóran prinsipiellan týdning fyri framtíðar leikarasáttmálar*



# GÍ fer víðari

**Í Gøtu halda tey framvegis ikki, at málið um leikloyvi hjá Súna Fríða Johannesen er rætt handfarið, og í løtuni verður umhugsað, hvørji stig nú skulu takast**

LEIKLOYVI
*Jákup Mørk*

Sum nevnt í blaðnum í gjár, so tóktist føroya mest umtalaða leikloyvi nú endaliga avgreitt.

Súni Fríði Johannesen, sum hevur skift GÍ-búnan um við tann hjá B68, hevur fingið leikloyvi útflýggjað frá Fótbóltssambandinum, og sjálvur var leikarin ikki í iva um, at hetta var rætta avgerðin. Týdningarmesta skjalið í hesum segðist vera eitt bræv, sum hann hevði fingið váttað frá GÍ, har felagið viðgongur, at leikarin ikki hevur nakrar skyldur mótvegis felagnum.

## Eingin leyslatan

Sum vit staðfestu í gjár, so var lítil ivi um, at um leikarin hevði fingið hetta váttað frá GÍ, so var hann leysur, men í Gøtu halda tey tó ikki, at málið er somikið einfalt.

Her vilja tey nevnliga vera við, at brævið, sum talan er um, als ikki er ein váttan frá felagnum. Her er talan hinvegin bert um eitt bræv frá leikarunum, har felagið hevur kvittað fyri móttøku, og so ikki meira verður sagt.

Í Gøtu eru tey í løtuni í fer við at viðgera málið, men hóast henda viðgerð ikki enn er endaliga liðug, hava vit fingið niðanfyrstandandi viðmerking frá nevndini.

»Vit eru kedd av at draga Súna Fríða upp í málið, tí fyri okkum er tað eitt prinsipielt mál um virði á sáttmálum, meira enn eitt mál um nakran ávísan leikara. Í samband við brævið, sum tosað verður um, so hevur formaðurin hjá GÍ váttað fyri móttøku av brævinum, á sama hátt sum var talan um innskrivað bræv, men har er eingin váttan um, at leikarin hevur frítt at fara.

Málið er mánakvøldið blivið avvíst av kappingarnevndini. Til tað siga vit, at vit skilja ikki, at málið er viðgjørt av kappingarnevndini. Tí málið er eitt mál um sáttmála og tilhoyrandi leikloyvi, og tí eigur málið heima í sáttmálanevndini ella í nevndini hjá FSF.

Málið er eftir okkara tykki heilt prinsipielt fyri okkum og fyri føroyskan fótbólt sum so. Og eru tað í hesum sambandi ikki pengarnir, sum eru avgerandi. Tí avgerðin hjá FSF er avgerandi fyri, um leikari hevur rætt til løn, hóast sáttmálin ikki verður hildin. Eftir avgerðini hjá FSF, so er eitt felag framhaldandi noytt at rinda leikara løn, hóast hesin systematiskt ikki yvirheldur sínar skyldur mótvegis felagnum. Verður lønin ikki rindað, er hetta sambært FSF at meta sum brot á sáttmálan, og hevur felagið tá ikki rætt til endurgjald fyri leikloyvið hjá leikarunum.

Nevndin umhugsar í løtuni, hvørji stig skulu takast. Sambært reglugerðunum hjá FSF fyri leikarasáttmálar, skulu trætur loysast við gerðarætti, og umhugsar nevndin í løtuni, hvørt hetta skal gerast, ella um málið skal leggjast fyri sáttmálanevndina.«

## Brævið avgerandi

Sostatt tykist lítil ivi vera um, at tað er áður umtalaða brævið, sum er avgerandi fyri málið. Er tað so, at GÍ bert hevur váttað fyri móttøkuna, og ikki fyri at loysa leikaran frá skyldum sínum, so er talan í hægstu grad um ein spurning, sum er sera prinsipiellur fyri fótbóltsfeløgini.

Kann leikari bara uttan víðari lata vera við at halda skyldu sínar mótvegis felagnum, fyri á tann hátt at verða loystur úr sáttmálanum, munnu flestu feløgini helst vera av teirri áskoðan, at sáttmálin ikki er stórt meira verdur, enn pappírið, sum hann er skrivaður á.

Tí bendir nógv á í løtuni, at gongdin í hesum málinum fer at fáa stóran týdning fyri, hvussu leikarasáttmálar og treytirnar í hesum verða skipaðar framyvir.

## Fakta

**Brot úr reglunum fyri leikarasáttmálar**

GREIN 5
Um leikarin hevur forfall til venjingar ella dystir, skal leikarin beinanvegin geva formanni og venjara felagsins fráboðan um hetta.

GREIN 11
Leikarin hevur rætt til løn undir sjúku, treytað av at leikarin heldur reglurnar í grein 5. Felagið hevur rætt til at krevja læknaváttan.

Grein 15
*Stk. 3*
Leikarin og felagið hava rætt til at gera avtalu um, at leikarin í sáttmálaskeiðinum kann skifta felag og gera nýggjan leikarasáttmála við annað felag.

*Stk. 4*
Felagið hevur rætt til at treyta frítøku av skyldum leikarans sambært hesi avtalu við, at nýggja felagið rindar felagnum eina upphædd, sum í minsta lagi svarar til higartil útgoldnu samsýningina í avtalutíðarskeiðinum, umframt eina upphædd, sum svarar til tær positivu útreiðslurnar, felagið hevur havt av leikaranum í avtalutíðarskeiðinum.

GREIN 16
Henda avtalan kann hvørki av leikara ella felag sigast upp í avtalutíðarskeiðinum, sí tó grein 15, stk. 3 um avtalaða uppsøgn.

*Stk. 2*
Um annar parturin munandi misheldur sínar skyldur sambært hesi avtalu, kann hin parturin hóast ásetingina frammanfyri, skrivliga siga avtaluna at fara úr gildi beinanvegin, og krevja endurgjald eftir vanligum reglum.

*Stk. 3*
Leikarin hevur ikki krav uppá at fáa útflýggjað sítt spæliloyvi, áðrenn leikarin hevur avgreitt alt sítt fíggjarliga millumverandi við felagið sambært hesi avtalu, herundir eisini møguligt limagjald til felagið.

GREIN 17
Allar ósemjur millum leikara og felagið, herundir ósemjur um tulking av hesi avtalu, ella um annar parturin hevur mishildið hesa avtalu, verða at leggja fyri ein gerðarrætt, har hvør parturin útnevnir sín gerðardómara. F.S.F. útnevnir ein ástøðumann, ið er formaður gerðarrættarins. Formaðurin skal vera løgfrøðingur.



## Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 4. apríl 2003, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 , grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Kryvjivirkið hjá P/F Viking Seafood á Strondum**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2932, P/F Repro-Z, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 28.01.2003.
**Nýtt navn:** P/F Reproz
Nevnd:
**Farin úr nevndini**: Gunri Johannesen, Blankagøta 10, 100 Tórshavn.
**Innkomin í nevndina:** Erling Jóannesarson Eidesgaard, Oman Viðarlund 6, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Jákup Zachariassen, Mækjugøta 17, 100 Tórshavn.
**Innkomin sum stjóri:** Erling Jóannesarson Eidesgaard, Oman Viðarlund 6, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 7. apríl 2003*
*Kristin Balle*

www.sosialurin.fo


## Góðir brúktir bilar

| | |
|---|---|
| **Nissan Sunny 1,6 St. Car** reyður, árg. 1993, 5 hurðar, km. 146.000 **39.000** | **Opel Vectra 1.6 Elegance Station Car** gráur, árg 2001, km. 21.000 **165.000** |
| **Nissan Primera 2,0 Dieselturbo** bronze, árg. 1999. 4 hurðar, km. 88.000 **139.000** | **Opel Vectra 1.7 Diesel** reyður, árg 1995, 4 hurðar, km. 118.000 **66.000** |
| **Nissan Primera 2,0 SE** Leður setur, aircon, grønur, árg. 1998. 4 hurðar, km. 105.000 **118.000** | **Opel Vectra 1.6 GLi** svartur, árg 1994, 4 hurðar, km. 122.000 **59.000** |
| **Peugeot 106 XR 1.4** reyður, árg. 1997, km. 80.000 **69.000** | **Opel Vectra 2.0 Aut.** brúnur, 4 hurðar, km. 195.000 **57.000** |
| **Peugeot 206 CC 1.6** árg 2001 **155.000** | **Opel Vectra 2.0 Diesel St. Car** bláur, árg 1997, 5 hurðar **125.000** |
| **Peugeot 306 Diesel** grønur, árg 1996, km. 155.000 **75.000** | **Toyota Avensis Sol 2.0 DTI** grønur, árg 1998, km. 185.000 **130.000** |
| **Peugeot 306 DT 1.9** grønur, árg 1996, 4 hurðar, km. 163.000 **75.000** | **Citroen Xantia 1,9 T, Station Car** gráur, árg 1998, km. 89.000 **140.000** |
| **Peugeot 306 Diesel** bláur, árg 1996, 4 hurðar, km. 130.000 **65.000** | **Kia Sephia** grønur, árg 1997, km. 88.000 **60.000** |
| **Peugeot 406 TS6 3.0 V6 v/klimaanleggi** gráur, árg 2001, 4 hurðar, km. 57.000 **210.000** | **Mitsubishi Galant 1.8** gráur, árg 1991, km. 161.000 **43.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.1 DT.** bláur, árg 1998, km. 153.000 **127.000** | **Ford Escort 1.6 St. Car** reyður, árg 1996, 5 hurðar **65.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.0 Hdi v/aircon.** vínreyður, árg 1999, 4 hurðar, km. 120.000 **154.000** | **Ford Escort 1.8** svartur, árg 1998, 5 hurðar, km. 123.000 **85.000** |
| **Peugeot 607 Ebene 2.2 Hdi aut. v/klimaanl.** gráur, árg 2001, 4 hurðar, km. 105.000 **259.000** | **Ford Escort 1.8 Diesel** grønur, árg 1995, 4 hurðar, km. 158.000 **65.000** |
| **Opel Corsa 1.7 DTi** grønur, árg 2002, 5 hurðar **132.000** | **Saab 900i, aut** grønur, árg 1987, 4 hurðar, km. 92.000 **25.000** |
| **Opel Corsa 1.4 Sport** árg 1995, km. 68.000 **50.000** | **Toyota Corolla 1.3** hvítur, árg 1996, km. 105.000 **67.000** |
| **Opel Astra 1.7DT St. car** reyður, árg 1999, 5 hurðar **115.000** | **Ford Mondeo DT 1,8 Diesel Turbo Station Car** hvítur, árg 1995, km. 135.000 **95.000** |
| **Opel Astra 1.7DT** brúnur, árg 1996, 4 hurðar, km. 156.000 **75.000** | **Ford Escort Van 1.8D** gráur, árg 2000, 3 hurðar, km. 74.000, nýsýnaður **68.000** |
| **Opel Astra 2.0 Dt** grønur, árg 2001, 5 hurðar, km. 40.000 **155.000** | **Opel Astra 1.7DT Van** bláur, árg 1998, 5 hurðar, km. 82.000 **v/mvg 78.000** |
| P/F Meinhardt Arge P/F Meinhardt Arge | P/F Meinhardt Arge P/F Meinhardt Arge |

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

**P/F Meinhardt Arge**
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61



## Brúktar arkivreolir til sølu

**Kompaktreolskipan av merkinum NORD-PLAN er til sølu fyri kr. 50.000. Talan er um 850 hillametur.**

**Vognurin er 80X300 cm og hillin er 40X100 cm.**

**Áhugaði kunnu venda sær til Føroya Banka í Tórshavn, tel 31 13 50.**
**Spyr eftir Herluf ella Hilbert.**

**Teldupostur: fyrisitingardeildin@foroyabanki.fo**

FØROYA BANKI



## Trø & runnar

**Besta plantutíð**

**Íslendskan Píl, Alaska Píl, Lærk, Bjørk, Ribes, Lonicera, Spirea, Hyld, Røn, Ribsbær, Sólber, Hindber, Poppel, Rabarbur og nógv nógv onnur**

**Eisini stórt úrval av staudum**

**Vit senda um alt landið**

**Annars alt annað til urtagarðin s.s. Kálk, gjøtning, móti mosa og ókrúti, græsfræ, blómuleyk, fræ, spagnum o.a.**

**Vit síggjast**

Sig tað við blómum

Fa. Karl Øster
Blómuhandil
Tvøroyri
Tlf. 37 10 94

Sosialurin 311820